ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

22. mars 2010
Mál: 10/00196-4
Viðgjørt: Click here to enter text.

Løgtingsmál nr. XX/2009: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg

§ 1

Í lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 179 frá 22. desember 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 32 a, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"**§ 32 a.** Heimahjálparaskipanin er partur av Heimarøktarskipanini. Í hvørjum øki undir Heimarøktaraskipanini kunnu heimahjálparar setast til at hjálpa til í heimum, eldrasambýlum og á ellis - og røktarheimum."
2) § 32 a, stk. 4 verður strikað.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Kap. 1. Almennar viðmerkingar
Hetta lógaruppskotið er ein avleiðing av, at verandi orðingin av § 32 a, stk. 4 er ein forðing fyri, at heimahjálparar kunnu arbeiða á røktarheimum, uttan so, at hesi við lóg sameina røktarheimsrakstur og heimarøkt. Hendan ásetingin er so trong, at tað bert er tá lóggáva er gjørd fyri tað einstaka røktarheimið ella økið, at til ber at sameina røktarheimsrakstur og heimahjálparaskipanina.

Skipanin við sameining av heimahjálp og røktarheimsrakstri hevur í fleiri ár verið roynd í Sandoynni. Sambært eini eftirmeting, sum varð gjørd av skipanini í 2002, er ein av fyrimununum við skipanini at, at leiðarin í størri mun fær skipa arbeiðið soleiðis, at starvsfólk verða flutt, har tørvur er á teimum. T.v.s. at røktartyngdin í økinum er avgerðandi fyri, hvar starvsfólki er. Leiðarin hevur t.d. møguleika fyri at skipa arbeiðið soleiðis, at heimahjálparar gjøgnum dagin skifta millum at arbeiða úti í heimunum og inni á eldrasambýlum og á røktarheiminum. Leiðarin kann eisini velja eina skipan har ein starvsfólkabólkur bert arbeiðir úti í heimunum hjá fólki, meðan ein annar starvsfólkabólkur bert arbeiðir inni á eldrasambýlum og røktarheimum.

Almannamálaráðið hevur eisini staðfest, at umsitingin av økinum longu hevur yvirhálað trongu skipanina, sum lógin leggur upp til. Í ávísum økjum t.d. í øki 2 er man farin undir líknandi skipan og hetta við góðum royndum. Ynskiligt er at kunna gagnnýta hendan møguleika í restini av landinum. Tí er endamálið við lógaruppskotinum, at heimild verður fyri at skipa heimahjálparaskipanina øðrvísi soleiðis, at heimahjálparar kunnu arbeiða á ellis- og røktarheimum, eldrasambýlum og í heimunum kring alt landið. Á tann hátt kann skipanin gerast meira smidlig og viðvirka til, at eldrarøktin kann skipast øðrvísi.

Uppskotið er sent fylgjandi pørtum til ummælis:

- Almannastovuni
- Nærverk
- Føroya Kommunufelagi
- Kommunusamskipan Føroya
- Stýrinum fyri Suðuroyar ellis- og røktarheimi
- Stýrinum fyri Norðoya ellis- og røktarheimi
- Stýrinum fyri Eysturoyar røktar- og ellisheimi
- Stýrinum fyri Røktar- og umlættingarheimi í Tórshavn
- Stýrinum fyri Røktar- og umlættingarheimi Lágagarð
- Stýrinum fyri Norðoya ellis- og vistarheimi
- Tórshavnar kommunu
- Heilsuhjálparafelag Føroya
- Almanna- og heilsurøktarafelagnum
- Felagnum føroyskum sjúkrarøktarfrøðingum
- Ergoterapifelagnum
- Fysioterapifelag Føroya

Viðmerkingar frá hoyringspørtunum:

Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Fíggjarligar avleiðingar
Uppskotið í sær sjálvum hevur ongar fíggjarligar avleiðingar. Broytingin kann viðføra eina meira smidliga skipan, sum ger tað møguligt at gagnnýta starvsfólkaorkuna betri og á tann hátt gera skipanina meira rationella.

Umsitingarligar avleiðingar
Uppskotið hevur í sær sjálvum ongar umsitingarligar avleiðingar, men givið er, at skal heimahjálparaskipanin broytast, krevst eitt ávíst fyrisitingarligt arbeiðið í samband við umlegging av bygnaði, arbeiðsuppgávum, setunarviðurskiftum og starvslýsingum.

Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið fær ongar avleiðingar fyri vinnuna.

Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið fær ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið fær avleiðingar fyri skipanina av eldrarøktini kring alt landið.

Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Broytingin fær ávirkan á starvsviðurskiftini hjá ávísum fakbólkum bæði í Heimatænastuni og á røktarheimunum. Nevnast skal somuleiðis, at hóast uppskotið er gjørt við útgangsstøði í skipanini á Sandoynni, leggur uppskotið ikki upp til, at fólk á røktarheimum kring landið fara at varðveita sína pensjón eins og tey gera á røktarheiminum á Sandoynni.

Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar

	Fyri landið/ landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Sosialar avleiðingar			Ja	Ja	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Sambært galdandi lóg kunnu heimahjálparar setast til at hjálpa til í heimunum, á eldrasambýlum og á røktarheimum, sum við lóg sameina røktarheimsrakstur og heimarøkt. Heimild verður nú fyri, at heimahjálparar kunnu arbeiða úti í heimunum, á eldrasambýlum og á ellis- og røktarheimum t.v.s. ásetingin um, at treytin fyri, at heimahjálparar kunnu arbeiða á røktarheimum er at røktarheimsraksturin og heimarøktin verður sameint við lóg, verður strikað.

Til § 2
Gildiskomuregla.

Almannamálaráðið, 10. mars 2010

Rósa Samuelsen
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen